

Niels Uni Dam · Hugleiðing

# MILLUM PLANETIRNAR

Um hesa tíðina seinastu fimm árini havi eg sum dómari á Planet Awards hugt aftur á tónleikaárið, ið fór, og gjørt mær nakrar niðurstøður. Hetta hendi aftur í ár, og samlaða niðurstøðan er, at føroyskur tónleikur er í blóma.

Hetta mátti eg staðfesta, tá eg sat við listanum við samlaða úrslitinum av fyrsta heilameldrinum, sum vit í Planet dómsnevndini høvdu havt. Eftir at allir seks dómararnir høvdu samskift í útvið eina viku, var ein sera langur listi komin burturúr.

Upprunligi listin hevði 24 potentiellar tilnevningar til ársins tónleikanavn, 16 til ársins útgávu, 18 til ársins songkvinnu, 30 til ársins sangara, 36 til ársins lag og 11 til ársins nýggja tónleikanavn. Hetta fortaldi søguna um eitt virkið tónleikalív, ið hevur nógv at bjóða.

## NÝTT OG GOTT GAMALT

Nýggj og spennandi tónleikanøvn sum Bendar Spónir, Marstin and The Revelators, Fróði Hansen, Katrina Petersen, Oniontree, Jákup Lind Dam, Analog Norð eru farin at gera um seg, meðan tey meira etableraðu nøvnini halda fram at mennast, og eisini at leita sær útum landoddarnar.

Nøvn sum Eivør, Teitur, The Dreams, Høgni, Linda, The Ghost, SIC, Boys In A Band, Guðrið Hansdóttir og Týr hava vent eygunum móti útheiminum, og hava ferðast á marknaðum, ið eru nógv størri enn tann føroyski. Enn er tað stóra gjøgnumbrotið ikki komið, men fyri hvørja konsert hesi okkara mentanarumboð spæla, verður føroysk mentan útflutt.

## FØROYSKUR TÓNLEIKUR Í LOFTMIÐLUNUM

Sum íðin nýtari av føroyskum tónleiki og av fjølmiðlum gleðist eg veruliga um, at nýggja Kringvarpsleiðslan hevur gjørt sær ómak, at geva føroyskum tónleiki pláss í útvarpinum og í ein ávísan mun eisini í sjónvarpinum. Hetta gevur mær og øðrum, ið ikki hava stundir at ganga á allar konsertir, ein møguleika at hoyra nýggjan føroyskan tónleik.

Hetta átti at verið ein natúrlig uppgáva hjá public service stovninum, men so hevur ikki verið áður. Hetta er harumframt eitt økið, har Kringvarpið hevur kappingarfyrimun mótvegis útlendsku netútvørpunum, so tí er hetta ordiliga gleðiligt. Tað hevur eisini verið stuttligt, at uppliva og enduruppliva framførslur av festivalunum í Kringvarpinum.

Enntá í Degi og Viku hava vit regluliga uppliva livandi tónleik. Har stendur serliga minimalistiska framførslan hjá Brandi Enni, av "Sometimes Truth Needs a Lie" ordiliga sterk í mínum minni.

## LINDA OG HENNARA X-FACTOR

Eg havi nógvar lastir og sjónvarp er ivaleyst ein av teimum verstu. Eg skal viðganga, at eg elski X-Factor. Spenningurin, talentini, vælspælandi bólkurin og Thomas Blachman, sum kann finna uppá líkt og ólíkt, alt hetta tilsamans riggar. Tí var eg eisini ein av nógvum føroyingum, sum fylgdi við, tá mín gamli floksfelagið Linda Andrews sang seg til sigurin í donsku útgávuni av kappingini, og ja – tað var ordiliga stuttligt.

## NÓGVIR SUMMARTÓNAR

Ongantíð áður hava so nógv stór tónleikatiltøk verið í Føroyum, sum í summar. Fjarðafestivalurin, Jóansøkufestivalurin, Summartónar, Asfalt, við Múrin, G!, Futt í Býnum, Summarfestivalurin og Nashville.fo fyltu føroyska summarið við tónleiki. Eg luttók á fleiri av hesum tiltøkum, sum tónleikari, ummælari og sum vanligur áskoðari. At fleiri av hesum tiltøkum tíanverri ikki bóru seg fíggjarliga, er harmiligt. Men hetta eigur ikki at sleppa at taka nakað frá upplivingunum. Við Múrin luttók eg sum tónleikari. Løtan á pallinum var ótrúlig, og fer at vera við mær í langa tíð. Sólin sum fór niður, ótrúliga vakra festivalumhvørvið og ein av bestu áskoðarfjøldunum, ið eg havi upplivað, hetta tilsamans gjørdi upplivingina so serliga.

## GÓÐAR TÓNLEIKAÚTGÁVUR

Sum høvuðsdómari og samskipari av dømingini á Planet Awards fái eg á hvørjum ári lista yvir allar útgávur, ið eru komnar út farna árið, og lat tað verða sagt beinanvegin, at listin í ár er nakað styttri enn hann hevur verið hini árini. Men verður hugt nærri at honum, so má staðfestast at støðið er serstakliga høgt. Umframt tær tilnevndu fløgurnar hjá Týr, Valravn, 200, Guðrið Hansdóttir og Peturi Pólsyni eru fleiri fløgur, ið eg havi hug at nevna. Eitt nú fínu poppfløgurnar hjá FAROE5 og Katrinu Petersen, umframt tær báðar kontrifløgurnar hjá Halli Joensen og The Reverends, ið á heilt hvør sín hátt geva sítt boð uppá, hvussu føroyskt kontri skal ljóða. Tað er eisini stuttligt, at tvey av okkara allar bestu og best umtóktu tónleikanøvnum hava valt, at geva konsertfløgu út, her hugsi eg um Eivør og Páll Finnur Páll. Hetta eru bæði tónleikanøvn, ið hava givið okkum nakrar av teimum bestu konsertupplivingunum seinastu árini.

## KIPTIR DARLINGAR

Tá eg í fjør setti meg í hýruvognin á veg heim av Planet Awards, var tað við eini ávísari gleði í búkinum. Tað var serliga heiðurslønin til bestu songkvinnu, ið gleddi meg. At Lena Andersen fekk hendan heiður var fult uppiborðið eftir eitt virkið tónleikaár, har hon hevði sungið seg inn í føroysk og útlendsk hjørtu, við sínari fantastisku rødd. Eisini eyðsýnda gleðin hjá Lenu um heiðurin, var smittandi. Lena var tá mítt boð uppá ein vinnara, og hon vann. Onkur onnur av mínum boðum vunnu eisini, men sum nógv onnur ár, vóru nógvir darlingar kiptir. Tað er jú avleiðingin av demokratisku tilgongdini, eg fái ikki altíð rætt. Eg gleði meg til nógvar góðar upplivingar, tá ársins planetir verða handaðar 27. desember.